# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*– At bretar taka hermenn úr Irak er tekin um, at samstarvið við irakar gevur úrslit*

*amerikanskur talsmaður*

# Hon var lítið størri enn ein pennur

**Amerikonsku læknarnir halda, at tann lítla Amillia er fyrsta barn, sum sleppur við lívinum eftir bara 22 vikur í móðurlívi.**



Amillia Taylor er einki minni enn eitt undur. Tann lítla gentan kom í heimin eftir at hava verið 21 vikur og seks dagar í móðurlívi. Vanliga gongur ein kvinna millum 38 og 42 vikur við barni.

Útgangsstøðið hjá læknavísindini er, at eitt barn, sum verður føtt so tíðliga, hevur ongan lívsmøguleika, og hóast læknavísindin hevur gjørt stór framstig á hesum sum á so mongum øðrum økjum, verður tað framvegis hildið ósannlíkt, at eitt barn, sum er yngri enn 24 vikur, sleppur við lívinum.

### 280 gram

Amillia varð borin í heim tann 24. oktober í fjør, men var alt, sum tað skuldi, hevði hon ikki komið í heimin fyrr enn nú. Teir seinastu fýra mánaðarnar hevur hon verið á Baptist Childrens Hospital í Miami.

Tá hon kom í heimin, vigaði hon 280 gram og var 24 sentimetrar long. Í læknavísindini verður 400 gram mett sum minsta likamsvekt, fyri at eitt barn skal koma undan á lívi, og læknarnir væntaðu heldur ikki, at Amillia fór at liva leingi.

Men fyrradagin fingu foreldrini at vita, um nú er Amillia komin so mikið fyri seg, at tey kunnu fáa hana við sær til hús takkað verði hennara egna lívsvilja og læknum, sum ikki vildu gevast, skrivar AP. Tað er heldur ikki av tilvild, at hon hevur fingið navnið Amillia. Tað er úr latíni og merkir áhaldni ella stríðsvilji.

Mamman sigur við tíðindastovuna, at teir seinastu mánaðirnir hava verið strævnir at koma ígjøgnum, og sum mamma hevur hon sum vera man havt ilt við at bíða eftir at sleppa at halda tí lítla fyri fyrstu ferð.

Amillia vigar ikk tvey pund enn, og læknarnir tora ikki at siga við vissu, um hon kann fáa nakað mein av, at hon varð fødd so tíðliga. Fyribils fær hon heilivág ímóti astma og hjálp til at draga andan, og læknarnir ætla at halda eitt vakið eyga við henni.

Myndirnar av lítlu Amilliu tala fyri seg.





## STUTT SAGT

### Klæðini kostaðu lívið

Ein kvinna, sum var ráðharri í einum landsparti í Pakistan, varð skotin í gjár, tí hon sýtti fyri at ganga í klæðum, sum islamskur siður krevur. Kvinnan doyði av skotunum. Løgreglan sigur, at Zill-e Huma, sum var almannamálaráðharri í landspartinum Punjab, varð skotin, tá hon kom til býin Gujramwala at hitta ein av sínum starvsbrøðrum. Maðurin, sum skjeyt, varð tikin. Løgreglan sigur, at hann hevur fyrr gjørt seg inn á kvinnur, sum sýta fyri at halda islamskar klædnasiðir. Umframt at vera ráðharri í almannamálum var Zill-e Huma kend fyri sítt stríð fyri rættindunum hjá kvinnum í Pakistan.

### Loyvir barnaporno

Í Ungarn er tann kynsligi lógaraldurin 14 ár, og landsins løgmálaráðharri heldur, at eru tey 14 ára gomlu nóg gomul til kynsligt samlív, er tað eisini í lagi við pornografiskum tilfari við børnum, sum eru eldri enn 14 ár. Eftir galdandi lóg er tað ikki loyvt at gera ella av hava pornografiskt tilfari við fólki, sum eru yngri enn 18, men tað heldur løgmálaráðharrin ikki vera sambæriligt við kynsliga lógaraldurin. Men andstøðan er ikki samd við ráðharranum. Hon heldur tvørturímóti ta ætlaðu broytingina vera púra burturvið.

### Le Pen í kreppu

Tann víðgongdi franski høgrapolitikarin Jean-Marie Le Pen kann fáa ilt við at stilla upp til forsetavalið, sum verður í mai. Lógin krevur, at 500 fólkavald umboð skulu stilla hann upp, men enn hevur hann ikki fingið so nógvar undirskriftir. Freistin fyri at stilla upp er úti í morgin, so Le Pen hevur skund. Í einari røðu í gjár segði hann, at fleiri milliónir franskir veljarar vilja hava hann at stilla upp, og tí eiga tey fólkavaldu at skriva undir uppstillingina. Le Pen fekk 17 prosent av atkvøðunum á forsetavalinum í 2002.

### Dráp skakar Rio

**Biltjóvurin koyrdi avstað við einum seks ára gomlum drongi hangandi uttan á bilinum.**

Í seinastuni er harðskapurin vaksin nógv í brasilska býnum Rio de Janeiro. Nógv fólk hava latið lív, men tað er serliga ein tilburður, sum hevur fingið øði í nógvar Rio-búgvar.

Tann tilburðurin var tann 7. februar. Tann seks ára gamli Joao Fernandes Vietes og mamma hansara vóru á veg ígjøgnum býin. Tá tey máttu steðga fyri einum ferðsluljósi, leyp ein maður fram og kravdi at fáa bilin. Mamman játtaði, fór úr bilinum og royndi at loysa tann lítla Joao úr trygdarseðlunum. Men biltjóvurin hevði ikki stundir at bíða, men koyrdi avstað við Joao hangandi í trygdarseðlunum uttan á bilinum. Ikki fyrr enn hann hevði koyrt sjey kilometrar, steðgaði tjóvurin bilinum, men tá var Joao deyður.

Tilburðurin hevur fingið øði í fólk í Rio de Janeiro, og fleiri túsund fólk hava verið í gøtunum og mótmælt harðskapinum.

Mikudagin í síðstu viku fór Joao til gravar. Løgreglan hevur tikið fimm ungar menn í sambandi við tilburðin, sum kostaði honum lívið.